# West Navion kós móti Atlantsmótinum

**Risastóra oljuskipið West Navion siglur nú við fullari ferð móti leiðini millum Føroyar og Hetland. Ætlanin er at seta borin í um mánaðarskiftið**

OLJULEITING
*Jan Müller*



*Boriskipið West Navion, sum næstu mánaðirnar skal finna fram til, um fyrsta oljufundið við Føroyar er rakstrarverdugt og farast kann undir framleiðslu einaferð*

Mánadagin gjørdi tað av føroyingum nógv eftirspurda og umrødda boriskipið West Navion sítt arbeiði út fyri Nova Scotia í Kanada liðugt og setti kós móti Atlantsmótinum. Sambært oljublaðnum Uppsteam er skipið nú heilt liðugt við sína boring fyri Marathon. Boringin, sum hevur verið nógv seinkað av ymsum orsøkum, vísir seg at kunna goyma eitt gassfund. Tað er tó enn ov tíðliga at siga nakað um, antin tað er lønandi ella ikki skilst á blaðnum. Hetta eru tó góð tíðindi fyri tey, ið har vara av.

Ben Arabo, stjóri í Amerada Hess, fegnast um, at tað loksins er eydnast at fáa skipið, sum teir nú hava bíðað eftir í nakrar mánaðir. Hann sigur skipið fer at vera á leiðini vestan fyri Hetland, skamt frá føroyska markinum seinast í hesum mánaðinum tvs. 28. ella 29. august, soleiðis at boringin kann byrja mánaðarskiftið august/september. Hetta er væl seinni enn ætlað. Upprunaliga varð roknað við, at boringin skuldi vera í juni ella juli. Tað er greitt, at henda seinkan er ikki serliga heppin fyri Hess og The Faroes Partnership, tí tess longur tað gongur út á heystið, tess torførari verður at arbeiða í hesum økinum við nógvum vindi og høgari aldu fyri ikki at siga við ódnarveðri.

Ætlandi skal boringin taka einar 70 dagar. Hesaferð verður tað so eisini farið undir at testa brunnin, tvs. at verður rakt við kolvetni, so verður ein lítil royndarframleiðsla móti endanum av boringini. Tað verður so eftir øllum at døma í seinnu helvt av oktober ella fyrst í november. Ben Arabo vónar sjálvandi, at teir finna olju og at líkindi verða til at testa. Í ringasta føri kann áhaldandi ódnarveður í vetur forða fyri eini royndarframleiðslu, nú boringin er so nógv seinkað. Ben Arabo vónar kortini, at hetta fer at koyra eftir ætlan.

Brunnurin, sum er eitt slag av avmarkingar- og eftirmetingarbrunni, tvs. ein appraisalboring, skal kunna geva fleiri upplýsingar um fundið, sum varð gjørt á føroyska landgrunninum í fjør. Eitt fund, sum serfrøðingarnir hjá Hess meta liggur báðumegin markið. Stóru spurningarnir eru, um goymslan er nóg stór til at verða lønandi, um onnur jarðfrøðilig viðurskifti eru í lagi og hvar størri parturin av feltinum liggur – á føroyskum ella bretskum øki. Sosialurin hevur frá keldum fingið upplýst, at tað er ikki óvist, at størri parturin av fundinum kann liggja á bretskari síðu. Men hetta hava vit ikki fingið váttað.

Nú brunnurin verður boraður í bretskum øki verða veitingarnar eisini úr Aberdeen skilst. Brunnurin hoyrir eisini undir skrivstovuna hjá Hess í Aberdeen og fer skrivstovan í Havn tískil ikki at hava nakað beinleiðis við boringina at gera, tó at tað verður fylgt væl við, nú talan møguliga er um eitt og sama felt, tað, sum funnið varð í Føroyum í fjør.






# Ansa børnum úti í Grøv

**Foreldrini at 40 børnum í Klaksvík hava fingið bræv um at teirra barn sleppur í útibarnagarðin úti í Grøv, sum letur upp í septembur. Hetta ger so eisini, at tað verða fleiri dagrøktarpláss**

BARNAANSING
*Solby A. Eliasen*



*Mong hava fílst á, at skúrarnir skulu verða nýttir til útibarnagarð, men tað er ongin orsøk til tað. Tað sær avbera gott út inni, og stendur onki aftan fyri aðrar stovnar*

**Klaksvík:** - Pláss verður fyri 40 børnum nú, og vit arbeiða við at fáa í øllum førum 20 pláss aftur at í ár – helst til 01. oktobur. Og um tað gongur so væl, sum vit ynskja, at tað skal fara at gera, so verða uppaftur 20 onnur pláss aftur at seinni í ár. Men tað letur til at vera so torført at arbeiða við hesum, at ein torir ikki at lova nakað sum helst, sigur Eyðgunn Samuelsen, formaður í sosialu nevnd í Klaksvíkar Býráð.

Hon greiðir frá, at tað verður ferðavinnan, sum skal syrgja fyri, at tað verða 20 pláss aftur at í ár, við tað, at tað skal gerast ein skúrur aftur at úti í Grøv, sum skal hýsa teimum 20 børnunum. Men tað hevur verið, og er framvegis, sera torført at fáa hendur á handverkarum.

- Tað hevur bert verið tann eini maðurin, sum hevur verið til arbeiðis harúti, og tað sigur seg sjálvt, at tað so tekur tíð. Men hann hevur simpulten ikki fingið nakran aftur at sær, sigur Eyðgunn, sum heldur, at tað er ørkymlandi at ein allatíðina rennur seg í onkrar trupulleikar, tá tað kemur til at fáa barnaansingartrupulleikan í Klaksvíkar Kommunu loystan.

Tað, at 40 størri børn sleppa inn í barnagarð, ger at tað verða nøkur fleiri pláss í dagrøktini. Tí tað eru tey elstu børnini á bíðilistanum og í dagrøkt, sum fara í útibarnagarðin. So er ætlanin, at børnini í aldrinum 0 til 3 ár skulu vera í dagrøkt, meðan tey størru fara í barnagarð ella útibarnagarð. Hetta er tað, sum tað verður arbeitt fram ímóti.

## 80 á bíðilista

Eyðgunn Samuelsen sigur, at tá hon tosaði við samskiparan av bíðilistanum seinast, hevði hon roknað leystliga út, at talið á bíðilistanum, eftir at øll børnini, sum sleppa í ansing nú, vóru farin av, var komið niður á umleið 80.

- Og hevði tað so eydnast okkum at fingið hasi 40 plássini aftur at í ár, so hevði tað hjálpt sera nógv upp á støðuna, sigur Eyðgunn og leggur afturat, at tað koma sjálvandi allatíðina fleiri børn á listan.

- Tað eigur eisini at vera so, men hasi 40 plássini eyka høvdu kortini gjørt stóran mun, heldur hon, men tað er ikki til at vita um, tað fer at eydnast at fáa tey plássini afturat.

- Um eg ráddi fyri øllum sjálv, ja, so vóru tað 80 pláss nú beinanvegin í septembur.

Starvsfólkini til útibarnagarðin eru sett, og leiðari er Jóhanna Vest, sum varð útlærd sum pedagogur frá Føroya Læraraskúla í februar í ár.

- Tað var eitt sindur viðvent hesuferð, tí leiðarin bleiv ikki sett, fyrr enn aftan á alt hitt starvsfólkið, men tað noyddust vit, tí tað søkti ongin pedagogur, og tí hildu vit tað vera neyðugt, at vit settu fólkini sjálvi. Um ikki leiðarastarvið hevði verðið sett, so høvdu vit lænt ein pedagog onkrastaðni til starvið. Tí útibarnagarðurin má kunna lata upp, men tann trupulleikin er tíbetur loystur nú, sigur Eyðgunn, sum við hesum vísir á, at tað eru so nógv ymisk ting, sum stinga seg upp og gera tað torført at arbeiða skjótari við tílíkum.

Hon sigur annars at tey eru sera spent upp á, hvussu tað fer at virka úti í Grøv.

- Tað sær sera gott út harúti, halda vit. Og tað stendur onki aftan fyri aðrar stovnar, so tað verður spennandi.

# Nýtt gamalt skip kom til Klaksvíkar

**Týsmorgunin kom Pison aftur til Klaksvíkar sum nýggjur eftir at hava verið til umfatandi umvælingar í Hirtshals**

UMBYGGING
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Tað var ein stásilig sjón at síggja Pison koma siglandi inn eftir vágni í Klaksvík týsmorgunin.

Angin av nýggjari máling kendist langa leið frá skipinum, tá ein kom gangandi oman móti keiini við bedingina í Klaksvík, har hann legði at týsmorgunin.

- So at siga alt er skift út, sigur Torleif Sigurðsson.

Herfyri tosaði Sosialurin við Petur Eliassen, skipari, sum tá var staddur í Hirtshals. Og hann segði, at um hann ikki visti, at tað var Pison, so hevði hann ikki kent hann aftur.

Og sigast má, at hann tók ikki munnin ov fullan. Tí skipið er sum hamskift.

Millum annað hevur Pison fingið nýggja brúgv, har øll útgerð er skift út, og eru viðurskiftini umborð soleiðis broytt nú, at manningin kemur bert at halda til har afturi í skipinum.

Nú verður skipið so riggað til at fara sín fyrsta túr eftir umvælingina, og Torleif sigur, at tað verður farið so skjótt, alt er klárt.

Tað eru 14 mans við Pison.



*Soleiðis sá Pison út, áðrenn hann fór til umvælingar í Hirtshals*



*Pison er sera nógv broyttur eftir umvælingina*